

# Spennandi avbjóðingar í Innlendismálaráðnum

**Dámar tær at vera har, sum avgerðirnar verða tiknar? Kundi tú hugsað tær eitt starv mitt í meldrinum? Og vilt tú vera við til at byggja eitt stjórnarráð upp frá grundini? Innlendismálaráðið hevur tørv á seks starvsfólkum at byrja skjótast gjørligt. Brúk er fyri tveimum deildarstjórum, tveimum fulltrúum og tveimum skrivstovufólkum.**

## Deildarstjóri til náttúru-, lendis- og umhvørvisdeildina

Høvuðsuppgávurnar hjá deildini verða í fyrstu atløgu at gera uppskot til ein náttúru-, lendis- og umhvørvispolitikk og at samskipa náttúrumál, lendismál og umhvørvismál umsitingarliga.

Deildin umsitur harumframt ymsa lóggávu, sum viðvíkur eitt nú náttúru og umhvørvi, ognartøku, matrikulering, tinglýsing, fólkayvirlit, byggi- og býarskipan.

Tað er ein treyt, at umsøkjarar hava løgfrøðiliga, búskaparliga ella hóskandi kandidatútbúgving. Hollar royndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum eru ein fyritreyt. Góður kunnleiki til føroyskt mál krevst.

Vit vænta, at umsøkjarar hava innlit í leiðslu, og at leiðsluhátturin er í samsvari við virðisgrundarlagið hjá miðfyrisitingini.

Starvsheitið er deildarstjóri og verður lønt sambært 37. lønarflokki hjá tænastumonnunum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir verða sambært avvarðandi sáttmála.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 35 80 80.

Umsóknir við CV, prógvum og møguligum viðmælum skulu innan 21. apríl sendast til:

Innlendismálaráðið, Tinganesi, Postboks 159, 110 Tórshavn.

## Deildarstjóri til Løgdeildina

Høvuðsuppgávurnar hjá Løgdeildini eru at vegleiða og ráðgeva fyrisitingini um lógarsmíð. Tað merkir eisini, at øll lógaruppskot og allar kunngerðir, sum miðfyrisitingin ger, skulu eftirkannast á Løgdeildini.

Løgdeildin umsitur og mennir kunngerðarblaðið og lógdátusavnið. Harafturat umsitur Løgdeildin ymsa lóggávu, sum viðvíkur eitt nú burturluting, persónsupplýsing, fyrisiting, vápn, nøvn og ríkislógir sum t.d. persóns-, familju- og arvarætt, útlendingarætt, løgreglu- og dómsmál umframt mannarættindi.

Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava løgfrøðiligt embætisprógv, hollar løgfrøðiligar royndir og analytisk evni. Harafturat eru royndir frá almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum ein fyritreyt. Góður kunnleiki til føroyskt mál er neyðugur.

Vit vænta, at umsøkjarar hava innlit í leiðslu, og at leiðsluhátturin er í samsvari við virðisgrundarlagið hjá miðfyrisitingini.

Starvsheitið er deildarstjóri og verður lønt sambært 37. lønarflokki hjá tænastumonnunum, tó uttan at vera tænastumannastarv. Setanartreytir verða sambært avvarðandi sáttmála.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 35 80 80.

Umsóknir við CV, prógvum og møguligum viðmælum skulu innan 21. apríl sendast til:

Innlendismálaráðið, Tinganesi, Postboks 159, 110 Tórshavn.

## 2 fulltrúar

Tvey fulltrúastørv eru leys at søkja í Innlendismálaráðnum. Høvuðsuppgávurnar eru málsviðgerð og lógarsmíð á teimum økjum, ið ráðið umsitur. Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv.

Umsøkjarar mugu hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða sjálvstøðugt, umframt at vera áhitnir og miðvísir. Vit vænta góðan kunnleika til føroyskt mál.

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og BLF.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 35 80 80.

Umsóknir við CV, prógvum og møguligum viðmælum skulu innan 21. apríl sendast til:
Innlendismálaráðið, Tinganesi, Postboks 159, 110 Tórshavn.

## 2 skrivstovufólk

Innlendismálaráðið søkir eftir einum skrivstovufólki til Landsfólkayvirlitið og einum skrivstovufólki til Kommunudeildina at byrja skjótast til ber. Vit ynskja, at umsøkjarar hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving.

**Landsfólkayvirlitið**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at føra landsfólkayvirlitið fyri Innlendismálaráðið umframt vanliga málsviðgerð og skrivarauppgávur í sambandi við Landsfólkayvirlitið. Landsfólkayvirlitið verður ført við serligari edv-skipan, og tú skalt vera við til at seta nýggja edv-skipan í verk. Málsviðgerð fer fram við DocuLive.

**Kommunudeildin**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um at føra journal fyri Innlendismálaráðið, vanligar skrivarauppgávur á deildini og annars at hjálpa til við øðrum uppgávum í kommunudeildini.

Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjármálastýrið og Starvsmannafelagið og verður lønt í lønarflokki III.

Tú fært meira at vita um størvini hjá Hilmar Høgenni, deildarstjóra á telefon 35 80 80.

**Umsókn og freist**
Umsóknir við CV, prógvum og møguligum viðmælum skulu innan 21. apríl sendast til:

Innlendismálaráðið, Tinganesi, Postboks 159, 110 Tórshavn.

Innlendismálaráðið varð stovnað eftir løgtingsvalið 2004. Í Innlendismálaráðnum starvast 18 starvsfólk. Landsstýrismaðurin í innlendismálum umsitur m.a. kommunumál, byggimál, kærumál, lógarmál, navnamál, útlendingamál, lendisskipan, náttúrumál, skógarmál, umhvørvismál, útjaðaramál og Strandfaraskip Landsins.

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ
Tel 35 80 80, Faks 35 80 85, Postboks 159
110 Tórshavn imr@imr.fo, www.imr.fo